# – Vit ynskja annan vinarbý í Íslandi

**Sambandið millum íslendska býin Selfoss og Fuglafjørð hevur ikki verið nøktandi tey seinastu nógvu árini. Arbeitt verður nú við at finna ein nýggjan vinarbý í Íslandi**

SAMSTARV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Síðani 1974 hava Fuglafjørður og Selfoss í Íslandi verið vinarbýir.

- Men hetta samstarvið hevur ikki verið nøktandi tey seinastu 15 árini, metir kommunan í Fuglafirði. Og tí verður nú arbeitt við at finna fram til annan íslendskan vinarbý, har eitt veruligt samstarv kann fáast í lag.

Hóast arbeitt verður við at útvega annan vinarbýr, ynskir kommunan kortini ikki at leypa frá avtaluni við Selfoss, hóast hon ikki hevur verið virkin í mong ár.

Áðrenn ein nýggj avtala verður fingin, skal ein fyrst geva Selfossi boð um avgerðina.

Gongst sum ætlað er ikki óhugsandi, at nýggi vinarbýurin hjá Fuglafirði í Íslandi kemur at eita Húsavík.

### Ikki virkin

Sambandið millum Fuglafjørð og Selfoss byrjaði fyri meiri enn 30 árum síðani.

Men býráðið í Fuglafirði kann í dag staðfesta, at hetta sambandið ikki hevur verið nøktandi, m.a. tí at íslendska kommunan ikki hevur verið so virkin í samstarvinum tey seinnu árini.

Á fundi í mentamálanevndini í Fuglfjarðar kommuna fyri tveimum mánaðum síðani varð m.a. tosað um vinarbýarsambandið við íslendska býin.

– Vit hava gjørt avtalur um vinarbýarsamstarv við Aalborg í Danmark og Ilulissat í Grønlandi.

– Og vit hava somuleiðis roynt at fingið eina avtalu um framhaldandi vinarbýarsamband við Selfoss, men hetta hevur ikki eydnast okkum, verður sagt úr Fuglfjarðar kommunu.

Í Fuglafirði halda tey seg hava gjørt nógv fyri at fáa hetta samstarvið at halda fram, men illa hevur gingið hjá hinum partinum í avtaluni.



*Fuglafjørður hevur havt samband við íslendska býin Selfoss. Men nú verður leitað eftir øðrum vinarbýi, tí hitt fyrra ikki var nøktandi*

### Sama støðd – sama vinna

Fyri seks árum síðani vóru táverandi býráðsformaðurin, Hallbjørg Hansen og formaðurin í mentamálanevndini, Jóhan Heri Joensen á vitjan í Íslandi í samband við eina kórkonsert.

Í sambandi við hetta vóru tey á vitjan á kommunuskrivstovuni í Selfoss, har tey handaðu eina umsitingarliga áheitan um at fáa skipað viðurskifti á vínarbýarøkinum.

- Hóast long tíð er liðin, kunnu vit í dag bara staðfesta, at tey í Selfossi vístu ongan áhuga – hvørki við at møta umboðum okkara ella at skriva undir nakra formliga avtalu, staðfest umboðini í Fuglfjarðar kommunu.

Út frá hesum er kommunan nú farin undir at fyrireika vinarbýarsamband við eina aðra íslendska kommunu, og hevur ein víst á íslendska býin Húsavík.

Hesin býurin liggur ikki so langt frá Seyðisfjørðinum, hagar Norrøna siglir um summarið. Tí liggur býurin rættiliga væl fyri, tá ein hugsar um møguligar vitjanir úr Føroyum. Talan er haraftrat um ein fiskivinnubý, sum hevur 1.800 íbúgvar.

### Arbeiða víðari

Hetta málið um vinarbýarsamband hevur verið til umrøðu í umsitingini í býráðnum, og líka er til, at áhugi er fyri at fara undir hetta samstarvið.

Mentamálanevndin hevði málið til viðgerð fyri einum mánaði síðani, og varð samd um at heita á býráðið um heimild at arbeiða víðari við tí.

Og tá býráðið hevði málið til viðgerðar 31. mars varð samtykt, at mentamálanevndin kann arbeiða víðari við málinum.

Samtykt varð eisini, at mentamálanevndin leggur málið fyri býráðið til endaliga støðutakan, tá øll viðurskifti í sambandi við nýggja vinarbýin eru greidd.

# Øll hava rætt til at samskifta

**Stór norðurlendsk ráðstevna fer í summar at seta fokus á týdningin av málinum hjá børnum. Gestir úr grannatjóðum okkara verða við, m.a. norski ráðharrin í undirvísingarmálum, umframt ein hópur av fakfólkum, sum arbeiða við málmenningini hjá teimum deyvu**



*Tey sita hugalig og fyrireika ráðstevnuna í summar – hm. Virgar Hvidbro og Edny Poulsen úr Føroyum, og vm. Britt Sæther Liltved úr Noregi og Anne-marie Ternstedt úr Svøríki. Tey hava alla orsøk at fegnast, tí talið av luttakarum er størri enn tey høvdu væntað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

RÁÐSTEVNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** – Hvussu verður barnið ment kensluliga og intellektuelt gjøgnum málið?

Hetta er evnið á eini ráðstevnu sum verður hildin á Hotel Føroyum í døgunum 29. og 30. august í ár.

Hetta er ein stevna, har ein væntar luttakarar úr øllum Norðurlondum. Orsøkin til hetta er, at henda ráðstevnan júst verður skipað sum ein partur av tí samstarvinum, sum longu er millum Norðurlond á hesum øki.

Ein líknandi ráðstevna sum henda varð hildin fyri tveimum árum síðani í Noregi, og er nú túrurin komin til Føroyar. Ætlanin er at skipa hesa ráðstevnuna annaðhvørt ár.

Á ráðstevnuni í ár fáa luttakararnir atongd til nógvar áhugaverdar fyrilestrar, eins og góð høvi eru til prát og tjak um felags áhugamál millum luttakararnar.

Og nógv felags áhugamál skuldu verið at práta um, tá eitt nú rektarar, sálarfrøðingar, námsfrøðingar, málvísindafólk, teknmálstulkar - og deyv, sjálvandi - hittast á sama staði.

### Ovurstór luttøka

Fyrireikingarnar til ráðstevnuna, sum Sernámsdepilin skipar fyri, eru komnar væl í gongd. Skal ein ganga eftir tilmeldingunum er líkt til, at áhugin er stórur.

Longu nú hava omanfyri 100 luttakarar boðað frá, at teir verða við á ráðstevnuni. Og hetta var meiri enn fyrireikararnir høvdu væntað.

– Men hetta vísir bara, hvussu stórur tørvur tað er á at koma saman at viðgera júst hesi evnini við samskifti og málmenning, sigur Edny Poulsen, sum saman við Virgari Hvidbro og umboðum úr Noregi og Svøríki skipa fyri ráðstevnuni.

Tey kunnu eisini fegnast um, at føroyingar hava víst hesi ráðstevnuni áhuga, tí einir 30 føroyingar hava somuleiðis boðað frá luttøku.

### Etiskt sjónarmið

Ráðstevnan byrjar mánadagin 29. august, og verður beinanvegin farið undir fyrsta evnið.

Hetta evnið er viðkomandi fyri øll – eisini tey deyvu – tí heitið á fyrsta fyrilestrinum er "Rætturin til eitt mál út frá einum etiskum sjónarmiði".

Seinnapartin er eitt annað áhugavert evni á skránni. Tá fara tveir av útlendsku gestunum fara at tosa um næmingar við serstøkum hoyribreki, har eitt tól er sett í innara oyrað, soleiðis at tey kunnu skilja tað, ið hini siga.

Um kvøldið verða allir luttakarnir bodnir til eitt føroyskt kvøld í Norðurlandahúsinum, soleiðis at gestirnir úr grannatjóðum okkara eisini fáa eitt innlit í føroyska mentan.

Týsdagin 30. august heldur ráðstevnan fram, tá tosast skal nærri um tann týdningin, sum málið hevur fyri menningina av barninum.

Seinnapartin henda dagin er stórur pallborðsfundur, har politikkarar úr øllum norðurlondum verða við. Millum hesar eru Jógvan á Lakjuni og Hans Pauli Strøm, saman við norska ráðharranum í kirkju- og undirvísingamálum, Jan Olav Olsen og Brit Hildeng, sum situr í almannanevndini í norska stórtinginum.

Seinni um kvøldið endar ráðstevnan við veitsludøgverða, og morgunin eftir fara luttakararnir hvør til sítt.